Starvslýsing

Kaupthing søkir tvey fólk

Fólk til kundarøkt

Nú Kaupthing Føroyar víðkar um sítt virkisøki, søkja vit eitt fólk til kundarøkt og ráðgeving innan fyri virðisbrævaøkið.

Í starvinum skalt tú
- hava ábyrgd av kundarøkt
- uppsøkja og hava samband við nýggjar kundar
- hava samband við verandi kundar
- hava ábyrgd fyri sølutilfari og øðrum upplýsandi tilfari á prenti og á teldu
- hava ábyrgdina av átøkum

Vit vænta, at tú
- ert væl orðað/orðaður í skrift og talu
- dugir væl enskt
- hevur hollan kunnleika til vanligastu KT- forritini
- hevur hægri fíggjarliga útbúgving ella bakgrund frá fíggingarstovni
- hevur góð samstarvsevni
- ert før/førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti

Vit kunnu bjóða
- spennandi avbjóðingar í einum felagi í menning
- eitt sjálvstøðugt starv, har tú sjálv/sjálvur leggur arbeiðið til rættis
- eina løn sum verður ásett eftir førleika og avriki

Fólk til umsitingina

Til umsiting av Íløgufelagnum Kaupthing Invest verður søkt eftir fólki til hálvtíðarstarv.

Í hesum starvinum skalt tú
- hava alla dagliga umsiting av íløgufelagnum um hendi – t.e. bókhald, roknskap o.l.
- røkja sambandið við myndugleikar, grannskoðara og íløguráðgeva

Vit vænta at tú
- hevur hollan kunnleika til vanligastu KT-forritini
- hevur skrivstovuútbúgving, peningastovnsútbúgving ella liknandi
- hevur góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða
- spennandi avbjóðingar í einum umhvørvi í menning
- eina løn, sum verður ásett eftir førleika

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 29. november 2002. Hevur tú hug at vita meira um størvini, ert tú vælkomin at ringja til Peter Holm, stjóra á telefon 351500.

Kaupthing er einasti stovnur í Føroyum, sum burturav hevur handil við virðisbrøvum sum sítt virkisøki.

Harumframt bjóðar Kaupthing Corporate Finance tænastur til føroyskar fyritøkur.

Kaupthing Føroyar er partur av Kaupthing-bólkinum við meira enn 500 starvsfólkum í 8 londum. 7 starvsfólk eru í føroyska felagnum.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn
tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo

lur st vn

N r url n h snum . s m r2 2

lum l r lafyrst uf l n fr r st vnun l r st lus, n fl r runn r ru r r l ntsm t num.

L s n v r ur hu l t, um fr mst ru r l s num s l: lum l r fr l s n kur r um nn l n rumf r.

Gr ll v r ur fr luv nnur yn um N r um r , lafyrst u- f l n fr l r fr, hvussul yh rtlh v r kl n r lf r- l k m nnn . fsh r F r s2 2 n rv l fr l k s vnn r n v luvnrus lumX l r, sum2 m n m sk l n m n r F r yum s l l sun. l r fr ml um r v r nskum.

Lut ku l r 1. kr nur, m n rtl l mur luv nnuf l num r l 75 kr nur. r sn lut ku l r k ff, m r unn m tur l sk rykk r.

S st fr st ll kn s rm ku n 2 . n v m r V nnuh s num lf. 311 ll um v s n m s un www.n ustry. .
Lf r 2 . n v m r n kk r lut ku l 5 kr num.

Skr

VINNUH 31

l uv nnuf l

Føroysk dálking skakar

Kurvan fyri koltvíútlát í Føroyum gongur bara uppeftir. Størstu útlátini av koltvíviltu stava frá fiskiskipum, sum standa fyri 32 prosentum

Tilvildarlig mynd

Eyðun Elttør er fyri fyrstu ferð av álvara komin í politiskt illveður, nú ein kanning staðfestir, at Føroyar eru millum heimsins mest dálkandi tjóðir. Lisbeth L. Petersen er skelkað, men hon ivast í, um hon styðjar eitt misálit í løgtinginum

UMHVØRVI
Ingi Rasmussen

Føroyar stinka. Tað má vera niðurstøðan, nú tað er staðfest í einari kanning hjá Heilsufrøðiligu starvsstovu, at vit hava tað triðhægsta útlátið í øllum heiminum av koltvíiltu fyri hvønn íbúgva.

Hendan skitna bronsumedaljan er lítið at erpa sær av hjá Eyðuni Elttør landsstýrismanni, sum hevur havt umhvørvismál um hendi síðan 1998. Serliga tá hugsað verður um, at útlátið í Føroyum bara er økt síðan 1995, meðan tað er minkað hjá øðrum londum.

Nýggju tølini fáa fólk at geva ilt av sær og vilja hava landsstýrismannin frá.

Átaluvert

Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum, er skakað av, at Føroyar liggja á einum triðja plássi yvir heimsins mest dálkandi, men hon ivast í politisku avleiðingunum.

– Hetta eru skelkandi tøl. Vit mugu taka málið upp beinanvegin og taka annað skinn um bak. Vit hava verið alt ov líkaglað við umhvørvið í Føroyum, tí vit hava hildið staðið væl, men tølini prógva, at vit onki hava at erpa okkum av, sigur hon.

Leiðarin í størsta andstøðuflokkinum vil kortini ikki siga, um hon styðjar eitt misálit á landsstýrismannin í løgtinginum, um tað verður lagt fram.

– Hetta er átaluvert, og hann (Eyðun Elttør, blǿm.) kundi helst havt gjørt meira. Men hetta er onki nýtt mál, og eg veit ikki, um tað hjálpir nakað at koyra hann frá. Eitt misálit er eitt stórt stig at taka, og tað vil eg ikki úttala meg um enn, sigur Lisbeth L. Petersen.

Inkompetentur

Nýggi flokksskrivarin hjá Javnaðarflokkinum, Hans Pauli Strøm, hevur annars í bløðunum um vikuskiftið mælt andstøðuni til at reisa misálit móti Eyðuni Elttør.

Hans Pauli Strøm sigur føroyska metið í umhvørvisdálking vera prógv fyri, at landsstýrismaðurin í umhvørvismálum er inkompetentur, og politiska avleiðingin má vera, at Eyðun Elttør verður koyrdur frá beinanvegin.

– Ein av grundunum fyri landsstýrissessinum hjá Eyðuni Elttør var, at nú skuldi gerast nakað við umhvørvismál í Føroyum. Men hann hevur sitið í fýra ár og ikki rætt hond frá síðu. Hann hevur so fullkomiliga misrøkt hesa almennu uppgávu og ábyrgd sína, sigur Hans Pauli Strøm.

Legg kongin

Formaðurin í Føroya Náttúruverndarfelag var eisini bersøgin um vikuskiftið . Við Útvarp Føroya segði hann, at vøksturin í føroyska útlátinum eigur at føra til, at samgongan legði frá sær og útskrivaði val. Hann heldur nýggju kanningina vera prógv fyri, at føroyskir politikarar ongantíð hava gjørt nakað fyri at verja umhvørvið.

– Eyðun Elttør hevur onki fingið av skafti í umhvørvismálum og fær tað heldur ikki. Tí eigur løgmaður at leggja kongin og skriva út nýval, sigur Kári Thomsen.

FAKTA

Føroyar høvdu í 1995 tað triðhægsta koltvíútlátið fyri hvønn íbúgva í heiminum. Bara Avstralia og Norðuramerika dálkaðu meira. Síðan tá er útlátið í Føroyum økt, meðan útlátini í grannalondunum standa í stað ella eru lækkað.

Størstu útlátini av koltvíiltu stava frá fiskiskipum (32%), húsarhaldum (20%), ídnaði (15%), elvirkjum (14%) og akførum (9%).

Útlátið fyri hvønn í íbúgva í Føroyum var meira enn 12 tons í 1995. Til samanberingar var útlátið í Noregi umleið helvtina.

Føroyanevndin vitjar í summar

Serliga Føroyanevndin hjá Fólkatinginum kemur til Føroya á vitjan 16. til 20. juni. Tað sæst at lesa á heimasíðuni hjá Fólkatinginum.

Nevndin fer at vitja løgtingið og tosa við løgtingslimir um útvald evni. Ætlanin er eisini at vitja ymisk virki og hyggja eftir samferðsluviðurskiftum.

Ætlanin er at bjóða forsætisráðharranum við, tá endaliga skráin fyri føroyavitjanina er liðug.

21-mannanevndin er mannað við umboðum úr politisku flokkunum á Fólkatingi. Hon var sett at fylgja við samráðingunum um framtíðarstøðu Føroya, sum vóru í 2000, men helt kortini fram at virka, tá samráðingarnar slitnaðu.

-ir